# Sjey spurningar til ríkisumboðsmannin

**Á fyrsta arbeiðsdegi sínum sum ríkisumboðsmaður, fekk Søren Christensen, nýggi ríkisumboðsmaðurin, sína fyrstu uppgávu á tingi. Hann skal svara sjey spuringum frá Høgna Hoydal**

POLITIKKUR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

- Tað eru beinleiðis politiskar metingar hjá nýggja ríkisumboðsmanninum, tá hann í samrøðu við Útvarpið m. a. sigur, at yvirtøkulógirnar og uttanríkispolitisku heimildarlógirnar geva Føroyum størri sjálvræði enn nakað annað øki í heiminum, sum er í ríkisfelagsskapi.

Tað heldur Høgni Hoydal, formaður í Tjóðveldisflokkinum, sum longu á fyrsta arbeiðsdegi ríkisumboðsmansins alment setti fram skrivligan fyrispurning.

Høgni Hoydal heldur tað eisini verða talan um politiskar metingar, tá ríkisumboðsmaðurin sigur: - at tað er loyvt andstøðuni at hava sina egnu hugsan um lógirnar, men at lógirnar eru samtyktar soleiðis *»at et flertal efter en god og sund demokratisk diskussion bestemmer, hvad reglerne er, og det er det der er sket her.«*

Høgni Hoydal sigur, at atfinningarnar hjá andstøðuni mótvegis viðgerðini av lógunum á løgtingi, ið m. a. elvdu til misálit á løgmann,v erða beinleiðis settar til viks, tí Ríkisumboðið sigur talan hava verið um »en god og sund demokratisk diskussion«.

Tí vil Høgni Hoydal hava at vita, hvat Ríkisumboðsmaðurin byggir sínar niðurstøður á, og um vit kunnu vænta, at ríkisumboðið fer at hava ein virknan leiklut í føroyskum politikki frameftir - bæði í almenninginum og á løgtingi, hóast hann ikki er fólkavaldur.

Teir sjey spurningarnir, sum Høgni Hoydal vil hava ríkisumboðsmannin at svara, eru hesir:

1. Nær og hvar er tann gongdin farin fram í sambandi við yvirtøkulógir og uttanríkispolitiskar heimildarlógir, sum Ríkisumboðsmaðurin í Útvarpi Føroya tann 1. august 2005 lýsti soleiðis: *"At det er jo en del af et demokratis spilleregler, at et flertal efter en god og sund demokratisk diskussion bestemmer, hvad reglerne er, og det er det der er sket her." ?*

2. Hvat ítøkiligt hevur verið "en god og sund demokratisk debat" í sambandi við løgtingsins viðgerð av bæði donsku og føroysku yvirtøkulógini og uttanríkispolitisku heimildarlógini, og hvat byggir Ríkisumboðsmaðurin sínar staðfestingar á?

3. Veit Ríkisumboðið um nakað annað parlament í heiminum, sum eftir trimum vikum og viðgerð á miðjari nátt, fyri fyrstu ferð hevur samtykt, at eitt parlament í einum øðrum landi hevur alt valdið, og at ein onnur stjórn og eitt annað parlament hava allar heimildir í uttanríkismálum - uttan at fólkið hevur verið spurt?

4. Veit Ríksumboðið um Gallup-kanningina frá juli 2005, ið vísir, at ein meiriluti av føroyingum er ímóti uttanríkispolitisku heimildarlógini, og at meira enn ein triðingur av teimum spurdu, ikki vita, hvat tey skulu halda? Heldur Ríkisumboðið, at hetta er tekin um "en god og sund demokratisk debat"?

5. Er nýggi Ríkisumboðsmaðurin ósamdur við fráfarandi Ríkisumboð, Birgit Kleis, sum við Sjónvarp Føroya hevur sagt, at hon heldur ikki, at nakað serligt nýtt er í uttanríkispolitisku heimildarlógini?

6. Tá Ríkisumboðið sigur, at Føroyar hava meira sjálvræði enn nakað annað øki í heiminum, sum er partur í einum "ríkisfelagsskapi", hvat samanber hann so Føroyar við, og hvar aðrastaðni í heiminum verður nakað rópt fyri ein "ríkisfelagsskapur", sum ikki er millum sjálvstøðug lond (hvussu verður ríkisfelagsskapur róptur á enskum)?

7. Hvørji onnur øki ella dømi sipar Ríkisumboðið til, tá hann samanber føroysku støðuna við onnur? Er tað Ísland, sum longu fyri meira enn 100 árum síðani hevði vunnið sær størri sjálvræðið enn føroyingar hava og sum ongantíð samtykti donsku grundlógina? Er tað Isle of Man? Eru tað Cook Islands og Niue, sum eru sjálvstøðugur limir í altjóða felagsskapum í egnum navni og hava egna grundlóg? Eru tað Aruba og Niðurlendsku Antillurnar, sum hava egna grundlóg og ikki eru løgd undir niðurlendsku grundlógina? Eru tað Puerto Rico og Northern Mariana Islands? Ella er tað Micronesia, ið gjørdist sjálvstøðugt við stuðli og 20 ára skiftistíð frá USA?



*Søren Christensen, nýggi ríkisumboðsmaðurin, hevur longu fingið fyrstu uppgávuna frá Høgna Hoydal: Sjey spurningar, har hann skal útgreina tað, hann segði við útvarpið mánakvøldið*




# Arbeiðsgevararnir taka undir við landsstýrinum

**Stjórin í Vinnuhúsinum fegnast um, at einskiljingartilgongdin í næstum fer av bakkastokki. Hann er samdur við landsstýrinum um, at peningurin frá sølunum av almennum ognum fyrst og fremst skulu nýtast til at niðurrinda uttanlandsskuldina**

EINSKILJING
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

- Hatta ljóðar sum heild skilagott. Tað er rættiliga positivt, at politikararnir hava tikið sær um reiggj og sett gongd á einskiljingartilgongdina.

Stjórin í Vinnuhúsinum, Jan Mortensen, fegnast um ætlanirnar hjá landsstýrinum at einskilja ein stóran part av almennu fyritøkunum. Hann vísir á, at Vinnuhúsið seinastu mongu árini hevur strongt á fyri at fáa ferð á einskiljingarnar, og nú tykist endiliga gongd verða komin á.

Í løgmansrøðuni á ólavsøku kom undan kavi, at landsstýrið hevur sett eina tíðarætlan fyri nær tær ymisku einskiljingar verða framdar. Millum annað hevur landsstýrið sett sær fyri at einskilja Føroya Lívstrygging, Fiskavirking, Elektron og Farmaleiðir, umframt partar av Føroya Banka, Føroya Tele og Atlantic Airways komandi ár.

## Skuld og íløgur

Í Degi og viku í gjár segði løgmaður, Jóannes Eidesgaard, seg vænta, at góðar tvær milliardir krónur fóru at koma burturúr einskiljingunum. Spurdur, hvat upphæddin skuldi nýtast til, svaraði løgmaður, at tað fyrst og fremst var uttanlandsskuldin hjá Føroyum sum skuldi niðurrindast.

Hesum sjónarmiði er Jan Mortensen samdur í.

- Eg er rættiliga samdur við løgmanni í hesum. Tað er ógvuliga týdningarmikið, at peningurin ikki fer í "umløb", og heldur verður nýttur til at niðurrinda skuld, so vit fáa meira luft á fíggjarlógini. Eg haldi eisini, at vit eiga at nýta ein part av peninginum til íløgur í framtíðina, tað verið seg í útbúgving og gransking, heldur stjórin í Vinnuhúsinum.